Fylgiskjal 2

FELAGIÐ PENINGASTOVNAR

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
uvmr@uvmr.fo

Dagfesting
3. november 2025

Hoyringssvar – uppskot til broytingar í Føroya Altjóða Skipaskrá

Víst verður til teldupost tykkara frá 9. oktober 2025.

Felagið Peningastovnar tekur undir við at reglurnar í FAS verða herdar. Til lógaruppskotið hava vit hesar teknisku viðmerkingar:

- Tað er ikki greitt, hvat stendur í § 1 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Altjóða Skipaskrá. Tað letur til at eitt ella fleiri orð mangla í setninginum, har tað stendur "Um tann ella teir fysisku persónar, (...), ikki eru búsitandi í Føroyum, **skal eigarin skrivliga til skipaskrásetingina** (...)".
- Sum nevnt beint omanfyri er tað ikki greitt, hvat stendur í § 1, so møguliga er svarið til hesa viðmerkingina eyðsæð, tá setningurin verður fullfíggjaður; men er tað rætt, at tað í somu áseting § 1 fyrst stendur "eigari ella leigari", og at tað síðan einans stendur "eigari" heldur enn "eigari og leigari"?

Eru ivamál ella spurningar hoyra vit fegin.

Blíðar heilsanir

Jean Djurhuus
formaður